

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 01 - 2012

# Supply Service eisini við í Kalvklumpen

Nú um dagarnar varð farið undir at bora á Kalvklumpen leitimiðinum í Norðsjónum. Vit søgdu frá í grein í gjár, at har vóru tvey føroysk fingramerki við í hesi boriverkætlan, nevniliga føroyska oljufelagið Faroe Petroleum og síðani havnarmaðurin, Teitur Poulsen, sum er fíggjarstjóri í Det Norske Oljeselskab, sum er operatørur fyri boringini. Nú hevur føroyskur oljumaður gjørt okkum varug við, at tað er enn eitt føroyskt fingramerki við í boringini av Kalvklumpen. Tað er Supply Service í Leirvík, sum hevur leigað út veitingarskipið Eldborg til hesa uppgávuna. Sostætt er eitt føroyskt supplyreiðarí, eitt føroyskt oljufelag og ein føroyskur fíggjarstóri hjá fyristøðufelagnum við í hesi eini boringini. Sí annars upprunaliga greinini her - Føroyingar eru við bæði so og so, nú borurin aftur er settur í norsku undirgrundina. Talan er um leitimiðið Kalvklumpen miðskeiðis í Norðsjónum. Faroe Petroleum er við í hesum brunninum við 20%. Men eisini í fyristøðufelagnum, Det Norske Oljeselskab er føroyskt tilknýti. Maðurin á kassanum har er eingin minni enn havnarmaðurin Teitur Poulsen, sum er fíggjarstjóri í felagnum, ið eigur 40% av loyvinum. Hini feløgini eru Noreco við 20% og Bayerngas Norge við somuleiðis 20%. Brunnurin liggur nær feltunum Føj og Heimdal. Tað er pallurin Songa Delta, sum stendur fyri boringini.